# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 21. desember 2009

# TB næstfremst á jólum

**Við væntaða sigrinum á ÍF leygardagin, megnaðu TB-kvinnurnar at spæla seg upp á næstfremsta plássið í Eik-liguni, har tær eru framman fyri Mjølnir, Fleyr og Drátt – men aftan fyri SÍ**




Hilmar Jan Hansen

Ikki kann sigast annað, enn at TB í síðstuni hevur spælt síni kort sera væl. Nú kappingin í Eik-liguni hjá kvinnum er farin í jólafrí, er liðið av Tvøroyri næstfremst. Himmalvíður munur er á tí og so síðsta kappingarári, tá TB endaði aftast.

Framvegis er SÍ liðið, øll hini síggja eitt fitt petti framman fyri seg, men nú er TB altso fremst av teimum næstfremstu. TB hevur sama stigatal sum Mjølnir og Fleyr, 12 stig, og síðani eru tvey stig aftur til Drátt, sum eisini er við í hesum »fýrabólkinum«, ið kappast um eitt finalupláss.

Merkisvert hevur verið síðstu dystirnar, at lið sum Mjølnir og Fleyr bæði eru snávað, hóast tey av teimum flestu hava verið mett sum favorittar at kappast við SÍ um at koma í FM-finalurnar í mars mánaði. At TB nú ikki bara hevur blandað seg, men eisini hevur yvirhálað, kundi bent á eina sera spennandi kvinnukapping eftir nýggjár.



**TB-kvinnurnar hava síðstu tíðina otað seg longur og longur upp á stigatalvuni, og nú flogbólturin hevur jólafrí, eru tær næstfremstar í Eik-liguni**

Savnsmynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

### TB-ÍF 3-0

(25-15, 25-16, 25-16)

Leygardagin tók TB í Trongisvági ímóti ÍF, ið bert hevur fingið tvey stig burtur úr sínum fyrstu 10 dystum, og sum væntandi var, vann TB ein sera greiðan og tryggan sigur. Longu frá fyrstu løtu sást, at sigurin á Fleyr lítla viku frammanundan hevði givið sjálvsálit, og TB vísti vinnaravilja beinanvegin.

Serliga vóru tað berandi kreftirnar, ið gingu undan, tí Katrin Nolsøe og spælandi venjarin, Gudrid Nolsøe, vóru tryggar og ídnar í álopsspælinum, ið varð væl skipað av hevaranum, Annimiu Johansen. Men sum heild var alt liðið hjá TB konsentrerað og fokuserað, so tað ongantíð datt í felluna, at fara niður í ferð og lata ÍF sleppa at stýra.

Hinvegin kom týðiliga til sjóndar, at ÍF hevði alt ov fáar streingir at spæla uppá, samanborið við mótstøðuliðið, og einasta veruliga hóttanin var Helen á Lakjuni. Tað var bara ikki nóg mikið, og sjálvt tá TB í triðja setti læt fleiri av teimum yngru sleppa framat, misti liðið ongantíð takið, men vann sannførandi.

## Eik-ligan kvinnur

| nr | lið | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 9 | 9 | - | 0 | 27 | 3 | 24 | 18 |
| 2 | TB | 9 | 6 | - | 3 | 21 | 10 | 11 | 12 |
| 3 | Mjølnir | 9 | 6 | - | 3 | 20 | 13 | 7 | 12 |
| 4 | Fleyr | 10 | 6 | - | 4 | 20 | 16 | 4 | 12 |
| 5 | Dráttur | 10 | 5 | - | 5 | 20 | 16 | 4 | 10 |
| 6 | ÍF | 10 | 1 | - | 9 | 3 | 27 | -24 | 2 |
| 7 | KÍF | 9 | 0 | - | 9 | 1 | 27 | -26 | 0 |

# Tung landsliðsuppgáva

**U17-kvinnulandsliðið í flogbólti tapti fyri Finnlandi í fyrsta dystinum í norðureuropeisku meistarakappingini í flogbólti, sum í hesum døgum er í danska býnum, Ikast. Fyrrapartin skuldu føroysku kvinnurnar spæla ímóti Onglandi**




Hilmar Jan Hansen

Kappingin um norðureuropeiska meistaraheitið í flogbólti ber heitið Nevza Cup, og hesa ferð eru Føroyar bert umboðaðar á kvinnusíðuni. U17-kvinnurnar eru komnar í bólk saman við Finnlandi og Onglandi, og í hinum bólkinum spæla Svøríki, Danmark og Ísland.

Norra plagar eisini at vera við, men hevur hesa ferð givið avboð. Hinvegin er Finnland komið við aftur, eftir at finnar hava hildið kappingina við hini norðurlondini verið ov lítið avbjóðandi, og tí ikki hava verið við.

At Finnland kann vera ein stórur biti, fekk føroyska liðið eisini at sanna í gjár, tá fyrstu dysturin hjá føroysku kvinnunum var júst ímóti teimum finsku. Føroyar taptu 0-3, og ongantíð var nakar ivi um, hvønn veg hesin dysturin fór. Bara í triðja setti megnaðu Føroyar at fylgja við í eina løtu, men so var eisini tað yvirstaðið.

Serliga vóru tað móttøkurnar, ið góvu føroyska U17-landsliðnum trupulleikar, tí finsku spælararnir høvdu sera góðar servur, ið tær føroysku høvdu meiri enn trupult at fáa fatur á. Tí spurdist lítið og einki føroyskt álopsspæl burturúr.

### Skuldu møta Onglandi

Fyrr um dagin hevði Finnland vunnið 3-0 á hinum liðnum í okkara bólki, Onglandi, men sum skilst, hevði finska spælið ikki verið so gott í tí dystinum, og tí komu sá enska avrikið – í øllum førum á pappírinum – munandi betur út. Finnland vann settini 25-12, 25-19 og 25-23.

Av tí at Finnland longu hevur vunnið báðar sínar dystir, er Finnland vinnari av bólkinum og skal seinnapartin í dag spæla hálvfinalu ímóti vinnaranum í hinum bólkinum, har Svøríki somuleiðis hevur bast bæði Danmark og Íslandi, og tí er bólkavinnari har.

Føroyar skuldu fyrrapartin klokkan 10.30 spæla ímóti Onglandi, og tað úrslitið var altavgerandi fyri, hvussu nógv føroysku kvinnurnar hava at spæla um víðari í kappingini. Vunnu Føroyar, kom liðið í hálvfinalu seinnapartin ímóti næstfremsta liðnum í hinum bólkinum, men taptu Føroyar, kom liðið beinleiðis til dystin um fimtaplássið, ið so verður í morgin klokkan átta ímóti niðasta liðnum í hinum bólkinum.

Talan er annars um eitt spildurnýtt føroyskt U17-landslið, sum er farið avstað til kappingina, og bara ein av spælarunum, Anja Danielsen, hevur royndir frá slíkum kappingum. Av tí at nógvir dystir hava verið í heimligu kappingini, hevur liðið heldur ikki havt so mong høvi at koma saman og venja, sum fleiri av hinum liðunum hava tað. Eitt nú ganga nógvir av spælarunum á svenska og danska liðnum á sama skúla og hesi londini hava tí væl samanspæld lið.

## U17-landsliðið, kvinnur

| Nr | Navn | Felag | Hædd | Aldur |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Hanna Olsen | Fleyr | 180 | 16 |
| 2 | Anja Danielsen | Fleyr | 179 | 17 |
| 3 | Gunnvør Joensen | TB | 166 | 16 |
| 4 | Hanna Hansen | Dráttur | 171 | 16 |
| 5 | Rakul Mari Johannesen | Fleyr | 165 | 16 |
| 6 | Urd T. Traðará | ÍF | 177 | 16 |
| 7 | Bára Johannesen | KÍF | 174 | 14 |
| 8 | Bára Jacobsen | TB | 175 | 16 |
| 9 | Guðrun Joensen | KÍF | 164 | 17 |
| 10 | Lisa Niclasen | SÍ | 162 | 17 |
| 11 | Rannvá Berg í Heiðunum | TB | 176 | 15 |
| 12 | Annika Mikkelsen | Fleyr | 169 | 16 |